# Galla skurður við kikaratøkni

Endamálið við skurðviðgerðini er at taka gallabløðru við gall-steinum.

## Skurðviðgerðin

Skurðviðgerðin verður gjørd í fullari doyving.
Ein kikari verður førdur inn ígjøgnum lítið hol undir nalvanum.
Harumframt vera 3 lítil hol gjørd á búkin til hjálpartól.
Hendingaferð kann verða neyðugt at skifta til vanliga gal-laskurðviðgerð.
Fyrimunurin við hesum skurðviðgerðarhátti er minni sárpína og stytri sjúkralega.
Tey flestu eru før fyri at fara til arbeiðis beinanvegin. Um neyðugt fæst læknaváttan frá egnum lækna.
Penturnar skulu takast umleiði 10. dag hjá egnum lækna.

## Fyrireiking innan skurðviðgerð

Tað er ein lætti fyri teg, um magin virkar sum hann skal.
Tú skal verða fastandi, tvs. hvørki eta drekka ella roykja frá kl. 24 kvøldið fyri. Tó er loyvt at busta tenninar sama morgun (ikki svølgja skolivatnið).
Tú verður biðin um at fara undir brúsu, áðrenn tú kemur skurðviðgerðardagin. Ver varin við, at nalvin skal verða reinur.

Tú skalt møta á deildini kl. 7.30.
Tekur tú heilvág, skalt tú taka hann við.

Á deildini fært tú eina song og klæðir. Sjúkrarøktarfrøðingur reinsar nalvan og klippir møgulig hár á búkinum burtur.
Fyribyrgjandi ímóti blóðtøppi fáa tygum eina sproytu og styðjusokkar.
Áðrenn skurðviðgerðina fært tú pínustillandi og um neyðugt avslappandi heilvág.

## Eftir skurðviðgerð

Eftir skurðviðgerð verður fari í viðrakningarrúmið, til tú er kláru/ur at fara á deildina aftur.
Afturkomin á deildina kanst tú fáa at eta og drekka eftir førimuni.
Vanligt er  at fáa pínu upp í akslarnar og nakað av skurðpínu.
Tú fært linnandi fyri pínu eftir tørvi, oftast tablett Panodil saman við giktheilivági.
Stílað verður ímóti útskrivan sama kvøld.
Tú kanst gera tað tú ert før/ur fyri.
Viðvíkjandi likamsrørslum, lyfting og arbeiði eru ongar avmarkingar.

## Ring til lækna:

- Um tú fært fepur
- Um tú fært sterka pínu í búkin

Vinarliga
Skurðambulatoriið B3
Torbjørn Viderø og Eyðfinnur/Randi Davidsen

Landssjúkrahúsið
tel 304500, www.ls.fo